# Nýggja Landssjúkrahúsið takast í nýtslu 23. februar

**Nú er dagurin ásettur fyri, nær nýggi bygningurin hjá Landssjúkrahúsinum skal verða klárur at taka í nýtslu**

NýBYGGING

*Áki Bertholdsen*



*Nýggi bygningurin hjá Landssjúkrahúsinum er rættiliga við at taka skap og nú er komið so mikið áleiðis, at dagurin er ásettur fyri, nær hann skal verða klárur at taka í nýtslu*

Nú er komið so langt at tað ber til at áseta dagin fyri, nær nýggi bygningurin hjá Landssjúkrahúsinum skal vera klárur at taka í nýtslu. Og tað verður 23. februar næsta ár.

Bill Justinussen, landsstýrismaður í heilsumálum sigur, at nú er alt byggiarbeiðið komið so mikið áleiðis, at tey hava sett sær sum mál at nýggi bygningurin skal takast í nýtslu 23. februar.

Tað er ikki av tilvild, at 23. februar er valdur er valdur til hendan merkisdag, tí júst hendan dagin fyllir Landssjúkrahúsið 80 ár og tað halda tey er ein hóskandi dagur at gera hetta risa framstigið fyri Landssjúkrahúsið.

– Tað haldi eg, at vit øll eiga at vera nøgd við, sigur Bill Justinussen.

Eftir ætlan verður sjálvur bygningurin verður liðugur á Ólavsøku. Men skal tað halda, verður neyðugt, at Løgtingið tekur undir við eini umsókn um eykajáttan upp á 13,3 milliónir til at gera bygningin lidnan fyri.

– Tað verður avgerandi fyri ætlanina frameftir at Løgtingið tekur undir við teirri eykajáttanini, tí annars kann bygningurin ikki gerast liðugur sum ætlað, sigur Bill Justinussen.

Umsóknin um tær 13,3 milliónirnar eru til viðgerðar í Løgtinginum í løtuni.

### Kunnu gera avtalur

Men eftir verður so tað stóra takið at fáa úgerð og útbúnað til tann nýggja bygningin so at hann kann takast í nýtslu.

Í tí sambandi hevur Bill Justinussen lagt eitt uppskot fyri tingið um eina verklagslóg.

Eftir lógini bindur Løgtingið seg til at seta pening av á komandi fíggjarlóg til útbúnað til nýggja Landssjúkrahúsið. Í mesta lagið bindur tingið seg til at seta 39 milliónir av til hetta endamálið.

Tað ger so aftur tað, at tá ið lógin er samtykt, kann Landssjúkrahúsið gera avtalur um útgerð og útbúnað so at tað kann verða leverað beinanvegin í tí nýggja árinum.

Bill Justinussen sigur, at tað er rættiliga long leveringstíð uppá sumt av útbúnaðinum, heilt upp í fýra mánaðir í summum førum.

– Tí er tað neyðugt at samtykkja eina verklagslóg, sum bindur Løgtingið at játta peningin næsta ár, tí annars kann Landssjúkrahúsið heldur ikki bíleggja útgerðina fyrrenn næsta ár og so verður bygningurin ikki tikin í nýtslu fyrrenn út ímóti sumri.

Hinvegin ber tað ikki til at fáa tólini leverað fyri 1. januar, tí tað er ikki lógligt at fáa útgerðina fyrrenn í sama ári, sum peningurin er játtaður.

Bill Justinussen sigur, at hóast bygningurin verður liðugur á ólavsøku, fer tíðin fram til 23. februar ikki fyri skeyti, tí hesa tíðina er ætlanin at brúka til at flyta ymsa útgerð úr gamla bygninginum yvir í tann nýggja.

– Tað skulu nógv tól úr gamla bygninginum yvir í tann nýggja og tað krevur eisini sína tíð, sigur Bill Justinussen.

### Fyri 44 milliónir

Tilsamans verður mett at útgerð og innbúgv fyri 44 milliónir skulu keypast til nýggja Landssjúkrahúsið. Tá er mvg ikki við.

Ymisk tung útgerð kostar 11 milliónir og tann lættara útgerðin kostar 28 milliónir. Harumframt skal innbúgv keypast fyri fimm milliónir.

Í ár eru 40 milliónir settar av til nýggja bygningin og av teimum skal tung útgerð keypast fyri fimm milliónir.

Tað er upplýst, at sumt av útgerðini skal byggjast inn í bygningin og hana er neyðugt at útvega samstundis sum bygningurin verður gjørdur liðugur.

Sostatt fevnir verklagslógin, sum er løgd fyri tingið, um tær 39 milliónirnar, sum enn mangla í til útgerðina, sum skal fáast til vega og setast upp næsta ár. Tó er tað so, at okkurt smávegis skal kortini bíða til 2005.

# Landsstýrið: Heðin Mortensen breyt lógina

**Tá ið Heðin Mortensen var virkandi býráðsformaður á einum býráðsfundi í Havn í heyst, breyt hann kommunulógina, ikki bara eina ferð, men tvær ferðir**

KOMMUNALT EFTIRLIT

*Áki Bertholdsen*



*Heðin Mortensen var virkandi borgarstjóri, tá ið býráðið hevði fund 24. oktober í fjør. Men hesum kom hann illa frá, tí tað endaði við at hann í tveimum førum breyt kommunulógina*

Heðin Mortensen er varaborgarstjóri í Tórshavnar Kommunu.

Á einum býráðsfundi 24. oktober var hann virkandi borgarstjóri og leiddi sostatt fundin

Men á hesum fundinum breyt hann kommunulógina.

Ikki bara eina ferð men tvær ferðir.

Tað slær kommunala Eftirlitið fast í eini avgerð, sum tað hevur tikið aftaná fundin.

Eftir fundin kærdi Leivur Hansen, býráðslimur framferðina hjá Heðini Mortensen fyri kommunala eftirlitinum.

Talan var um ein býráðsfund fyri afturlætnum hurðum, har eitt starvsfólkamál var til viðgerðar.

Á hesum býráðsfundinum vóru níggju býráðslimir møttir, fimm úr meirilutanum og fýra úr minnilutanum.

Tann eini býráðslimurin fyri meirilutan var Páll Petersen, sum var varamaður fyri Bjarta Mohr, sum hevði farloyvi.

Táið starvsfólkamálið skuldi takast til atkvøðugreiðslu, boðaði Páll Petersen frá, at hann tók ikki undir við tilmælinum frá meirilutanum, men ístaðin fór at atkvøða fyri minnilutatilmælinum í málinum.

Hetta hevði ført við sær, at tilmælið hjá minnilutanum fór at verða samtykt við fimm atkvøðum ímóti fýra.

– Tá gjørdi virkandi borgarstjórin, Heðin Mortensen ikki mætari enn at hann tók málið av skránni so at tað ikki kom til atkvøðugreiðslu. Hetta gjørdi hann hóast hvøss mótmæli bæði frá Páll Petersen og frá minnilutanum.

Samstundis noktaði hann minnilutanum at fáa sínar viðmerkingar til gongdina í gerðarbókina hjá býráðnum.

### Sum siður er

Heðin Mortensen hevur fortalt kommunala eftirlitinum, at Páll Petersen hevði boðað frá, at hann kendi ikki málið nóg væl og at hann tí var í iva um, hvussu hann vildi atkvøða.

– Tí tók eg málið av skránni, sum siður er, fyri at geva Páll Petersen høvi til at seta seg nóg væl inn í málið til næsta fund.

Men hetta vil Páll Petersen ikki kennast við.

Hann hevur boðað eftirlitinum frá, at tað var ikki torført hjá honum at taka støðu, tí drúgva orðaskiftið um málið gav honum innlit í gongdina í málinum.

Hann segði, at hann var samdur við tilmælinum hjá minnilutanum og at hann tí ætlaði at atkvøða saman við minnilutanum.

– Tá vendi Heðin Mortensen sær hvassliga til mín fyri at vita, hvussu eg fór at atkvøða.

Tá ið Heðin Mortensen so fekk at vita, at Páll Petersen ætlaði at atkvøða saman við minnilutanum, tók hann málið av skránni.

### Kann ikki takast av skrá

Kommunala eftirlitið sigur, at tað eru borgarstjórarnir, sum skulu lýsa málini, sum koma til viðgerðar á fundunum, soleiðis at kommunustýrislimirnir kunnu taka støðu til tey.

Hava kommunustýrislimir ikki fingið nóg góðar møguleikar at fyrireika seg til eitt mál, sum teir tí ikki kunnu taka støðu til, kunnu teir mótmæla. Og so kann kommunustýrið ikki taka avgerð í málinum, uttan so, at tað er um at fyrnast, ella at málið er av slíkum slag, at støða kann verða tikin til tað av handahógvi - uttan fyrireiking.

Sostatt kunnu kommunustýrislimirnir krevja mál útsett, eru tey ikki nóg væl fyrireikað. Og sostatt er tað er kommunustýrið, sum í seinna enda má taka støðu til, um ávíst mál er nóg væl fyrireikað ella ikki.

Eftirlitið sigur, at tá ið fundarskráðin er send kommunustýrislimunum, men ein kommunustýrislimur ynskir at taka uppskot sítt aftur, eigur borgarstjórin, beinanvegin fundurin byrjar, at boða frá hesum og samstundis spyrja, um nakar annar kommunustýrislimur ynskir at taka uppskotið upp, t.e. at gera tað til sítt uppskot.

Um so er, kann tann kommunustýrislimurin, sum upprunaliga setti uppskotið fram, ikki forða fyri, at uppskotið verður viðgjørt.

Somuleiðis verður mett, at hesin framferðarháttur eigur at verða nýttur, um eitt uppskot verður tikið aftur, tá viðgerðin er byrjað.

– Tá ið ávíst mál er komið á fundarskránna, og fundurin er byrjaður, metir Løgmálaráðið tí, at borgarstjórin ella tann, sum leiðir fundin, undir ongum umstøðum einsamallur kann taka málið av skránni tí teirri grundgeving at einstakur kommunustýrislimur skal fáa betri høvi til at seta seg inn í málið.

– Um kommunustýrislimir eru nóg væl fyrireikaður ella ikki, má tí standa til viðkomandi sjálvan at taka støðu til. Og annars tendur tað til kommunustýrið at gera av, um eitt mál er klárt at atkvøða um, ella ikki.

Annars sigur Kommunala eftirlitið, at hevur ein kommunustýrislimur serstøðu í ávísum máli, kann hann krevja, at serstøða hansara í stuttum verður viðmerkt í gerðabókina og tað kann ikki verða sýtt.



# Sirri í Gongini



*Starvsfólkið og klæðini hjá Sirri eru farin at húsast í Gongini*

*Mynd: Jens Kristian Vang.*

HANDIL

*Heri á Rógvi*

Handilin Sirri, ið selur ymsar vørur úr føroyskari ull, eru fluttur av Àarvegnum oman í Fútastovu í Gongini.

Hjúnini Karin og Árni hava nú havt opið í Sirri í trý ár.

Árni Brattaberg sigur, at tey í nýggju hølunum hava fingið munandi meira pláss at húsast í.

– So hevur húsið eisini eina spennandi søgu og er tískil spennandi hjá ferðafólki, sigur Árni Brattaberg.

Handilin letur upp 1. apríl, og tá verður eisini móttøka millum kl. 15 og 17.




